

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 03 - 2013

# Oljuvinna í Arktis lønar seg ikki við lágum oljuprísi

Fer oljuprísurin at liggja um 90 dollarar fyri tunnuna er sera ivasamt, um tað fer at loysa seg at taka oljuna upp í Arktis ávarar oljugreinarin, Torbjørn Kjus frá norska bankanum, DNB. Arktis og oljumøguleikarnir har eru at meta sum eitt ævintýr, sum kann gerast til einki annað enn eina góða søgu. Hann heldur, at oljuprísurin fer at lækka munandi komandi árini til 90 dollarar fyri tunnuna í 2020, og við ein so lágum oljuprísi, er ikki vist, at tað fer at loysa seg at útvinna olju í Arktis í heila tikið. "Oljutunnur úr Arktis seta krøv til ein hægri prís enn 90 dollarar, fyri at kunna gera íløgur í økinum sigur Torbjøn Kjus til Dagens Næringsliv. "Vit fara at síggja, at tá íleggjarar í 2016 og 2017 skulu taka avgerð um, hvar í heiminum teir skulu gera íløgur, so fara teir at halda seg aftur at gera slíkar íløgur í Arktis við einum oljuprísi uppá 90 dollarar. Og við útliti til, at prísurin ikki fer at hækka í bræði, fara teir at venda Arktis bakið, sigur norski greinarin. Veðurlagsbroytingar og vaksandi eftirspurningurin eftir olju og gass í heiminum umframt tann høgi oljuprísurin hava fingið bæði oljufeløg og landastjórnir at vísa Arktis stóran ans. Serstakliga eftir at amerikanski jarðfrøðisstovnurin í 2008 kom við metingum um, at Arktis goymir upp til 25% av øllum fjaldum olju- og gassgoymslum í heiminum. Í dag liggur oljuprísurin í eini legu uppá 114 dollarar fyri tunnuna, og slíkur prísur ger, at oljufeløgini eru hugað at gera íløgur í Arktis. Men hetta kann skjótt broytast, um prísurin fer at hækka munandi.